Dimmalætting

Stovnað 1878
*Ábyrgdarbladstjóri:*
Beate L. Samuelsen
*Bladstjóri:*
Georg L. Petersen
*Útgevari:*
P/F Dimmalætting
*Prent:* Dimmalætting

AVGREIÐSLA: Manad. til hosd. kl. 8.00-17.00. Friggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard. stongt. Tlf.-avgreiðsla kl. 8.00-16.00.
Tlf. 311212. Fax: 310941. Smyrilsvegur 13, Postboks 19, FO-110 Tórshavn.
*e-mail:* redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysing@dimma.fo, haldari@dimma.fo, bokhald@dimma.fo, kronikk@dimma.fo, vidskerin@dimma.fo

**INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR**

| | Týsdags-bladið | Mikudags-bladið | Hósdags-bladið | Friggjadags-bladið | Leyg.dags-bladið |
|---|---|---|---|---|---|
| Størri lýsingar | fri. kl. 12 | mán. kl. 12 | týs. kl. 12 | mik. kl. 12 | hos. kl. 12 |
| 2 tg. tekstlýsingar | má. kl. 10 | týs. kl. 10 | mik. kl. 10 | hos. kl. 10 | fri. kl. 10 |
| Okkara Gulu | fri. kl. 15 | | týs. kl. 15 | | hos. kl. 15 |

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inni í góðari tíð.
Litlýsingar og lýsingar við framíhjáplassi skulu bileggjast í góðari tíð.

**Vanligar treytir:** Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir bladsins meti kunnu mistakast fyri bladtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppi lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

**Fyrivarni:** Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Bladið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum bladið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at bladið má tilskila sær rætt til at
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað.
Litlýsingar kunnu bert takast við, um teknisku viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir bladsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur bladið onga ábyrgd av.
Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og bladið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

# Mugu seta norðmonnum krøv

Toskastovnurin í Barentshavinum er ikki væl fyri sambært ICES, sum mælir til at skerja kvotuna 100.000 tons, so samlaða veiðan verður 380.000 tons. Hetta er ein stórur niðurskurður, og sambært norska fiskimálaráðharranum, sum júst hevur vitjað, fara føroyingar eisini at merkja sviðan av hesum.

Tað ljóðar ikki meira enn rætt og rímiligt, at tá minni fiskur er, so má eisini minni fiskast. Men fortreytirnar fyri kvotabýtinum í Barentshavinum eru broyttar munandi seinastu tíðina. Ísland hevur nevniliga fingið avtalu í lag við norðmenn um at fáa fastan prosentpart av kvotuni. Henda avtala kom í lag, tí norðmenn vildu sleppa undan, at íslendingar fiskaðu ólógliga í Loynikrókinum. Ein fiskiskapur, sum rakti føroyingar á tann hátt, at hótt varð við tiltøkum frá norskari síðu, um fiskurin fór um føroyskan bryggjukant, ella um skipini vóru undir føroyskum flaggi, sum royndu í Loynikrókinum. Vit góvu eftir, tí ótti var fyri kvotuni í Barentshavinum. Íslendingar hildu bara fram og endaðu við at vinna sær kvotu í Barentshavinum.

Her vístu norðmenn eitt ljótt lyndi, sum eisini er gingið út yvir tey før, sum fiska í norskum sjógvi. Reiðarar hava kent seg forfylgdar av norsku myndugleikunum, og hóast vit ikki við vissu kunnu siga, um tað er av røttum ella ikki, so kundi framferðarhátturin á øðrum økjum givið hesum skuldsetingum trúvirði og innihald.

Vit standa í øllum førum til at missa rættindi í norskum sjógvi, tí ov lítið er til, meðan nýggir partar fáa tillutaða kvotu, sum í samlaðu uppgerðini merkir, at enn minni verður í okkara part. Einaferð mugu vit gera upp við okkum sjálvi, um vit framhaldandi skulu boyggja okkum fyri norskum ágangi av ótta fyri at missa grundarlagið undir einum týdningarmiklum parti av flota okkara í Barentshavinum. Einaferð má tað vera nógmikið, og tá eiga allar kreftir í landinum at standa saman. Vit hava eina oljuvinnu, sum kann fara í gongd, innan ov langt umlíður, og hetta átti at verið ein trumfur hjá landsmyndugleikunum, tí øllum kunnugt eru norsku oljuáhugamálini stór. Vit mugu í einum lítlum og viðbreknum samfelag sum okkara blanda tingini saman viðhvørt, tí hvør sær megna vit ikki tað stóra. Eisini mugu norsku áhugamálini í ali- og fiskivinnu annars takast uppí. Tað kann ongantíð vera meiningin, at norsk áhugamál fáa fría atgongd til føroyska vinnulívið, meðan Noreg setir forðingar fyri føroyskum áhugamálum í Noregi.

## Minningarorð

# Minningarorð um Børge í Syðradali

Tung vóru deyðsboðini av kæra manni, pápa, fosturpápa, abba og verfaðir okkara Børge, sjálvt um tey ikki vóru óvæntað, tí Børge hevði verið álvarsliga sjúkur av krabbameini í umleið eitt ár. Men tað er altíð ringt at missa foreldur og er so ómetaliga hart at skilja, at tú ikki ert her ímillum okkum longur.

Á jólum 1998 var eg heima í ein mánað, og tá var fosturpápi mín longu so ússaligur, at hann var seingjarliggjandi og orkaði einki longur.

Hesa myndina av Børge vóru vit ikki von við. At hesin sunni, raski arbeiðsmaðurin við góða dæminum, sum gekk langar túrar úti í náttúruni, át góðan, sunnan føroyskan mat og livdi eitt frískt lív, brádliga skuldi fáa eina so herviliga sjúku við deyðiligum útgangi, hetta fata vit ikki.

Av tí at íslendski pápi okkara, systur mínar Tórunn og mín, Ásgeir, doyði longu áðrenn eg varð fødd – og Tórunn er bert 16 mánaðir eldri enn eg – hava vit bert kent til og havt ein pápa, og ein sera góðan pápa í Børge. Hann tók okkum sum síni egnu børn undir sínar veingir, og tá so Sigmund, okkara lítlibeiggi, varð føddur, var hann stoltur sum ein pávi. Hann gav okkum øllum eitt gott heim og ein tryggan og góðan uppvøkstur saman við mammu. Ongantíð hava húsini á Dalagøtu 22 staðið tóm, so leingi sum Børge livdi. Tað má nokk sigast at vera eitt sindur sjáldsamt í okkara tíð, tá øll arbeiða so nógv og ferðast hvørt ár.

Men soleiðis var eisini eitt eyðkenni hansara. Hann var altíð har fyri okkum og kendi ábyrgd av familju síni til fulnar. Vit komu altíð fyrst. Sum tá vit tosaðu við sóknarprestin Berg D. Joensen (her vilja vit enn eina ferð nýta høvið at takka honum fyri tey góðu orðini um Børge til jarðarferðina), so er hann ein av teimum fáu, ið veruliga hvønn dag livdu upp til eitt av boðunum í Bibliuni, nevniliga næstrakærleikan.



Jú, Børge í Syðradali var bæði ein orðhildin maður og eitt gjøgnumfínt menniskja. Hann bar ikki hatur til nakran, og rættiligan óvin mundi Børge neyvan eiga.

Fyri hálvum ári síðan, tá vit báðar, Tórunn og eg, vóru heima (vit búgva báðar í Danmørk), vistu vit og Børge sjálvur, at hetta nokk varð seinastu ferð, vit soust. Vit prátaðu nú mest um, hvussu góð vit vóru hvør við annan, og alt tað hann hevði verið fyri okkum. Vit royndu eisini at hugna okkum sum frægast, sum man nú kann, tá »deyðin við líggjanum« lurtar við. Kortini høvdu vit eina vón um eitt stórt undur, ið kundi gera fosturpápa okkara frískan aftur. Ein trýr til tað síðsta, men soleiðis er lívsins gongd. Tann tíðin, vit skulu fara til himmals, kemur einaferð til okkum øll, eingin sleppur undan.

Børge var sum persónur ein friðarligur og fyrikomandi maður, men hann hevði sína meining og hevði eisini ein góðan, ektaðan humor. Dámdi væl at arga okkum eitt sindur, men fór væl við okkum kortini, somuleiðis sum hann altíð hevði sjálvspei.

Hann var tjóðveldismaður um ein háls, og alt føroyskt lá honum nær at hjarta. Hann lærdi okkum at virða alt føroyskt, málið, siðirnar, søguna og kvæðini o.s.fr.

Sum ítriv var tað sjálvandi fyrst og fremst B36, sum hann var ein ágrýtin viðhaldsmaður hjá. Hann misti ongan dyst, áðrenn hann legðist sjúkur, og var hann ein so trúfastur stuðul av hesum fótbóltsliði, at tá hann ikki megnaði longur at fara á plenuna, bað hann tó altíð sonin Sigmund keypa sær eitt atgongumerki. Tí vóru vit so fegin um, at vit kundu halda ervið í B36-húsinum, hetta hevði Børge dámt væl.

Annars fjasaðist hann eitt sindur við seyð og gav villdunnum at eta úti á Marknagili, og hann hevði sjálvandi eisini hund og kettur at taka sær av á Dalagøtu og var góður við.

Vit eru fegin um, at Børge upplivdi at verða abbi at Oliviu og Svannu. Tá eg seinasta summar sá hann mála dukkuhúsið uttanfyri til abbabørnini, varnaðist eg, at Børge var viknaður í mun til tað, hann plagdi at vera.

Nú er hann farin, men øll góð minni liva víðari. Tann dagin, Børge fór til gravar, skein sólin av tí allarfagrasta, eitt tekin um, at hann nú hvílir í friði og hevur tað gott uppi hjá Gudi.

Til seinast havi eg valt eina yrking hjá Rudyard Kipling, ið altíð hevur mint meg um Børge og tey lívsvirði, hann stóð fyri.

Ærað veri minnið um teg, Børge, og hvíl í friði, kæri fosturpápi, pápi, maður, abbi og verfaðir okkara.

Familjunnar vegna
**Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir**

------------

## If

*(Brother sqare – Toes' - Rewards and Faires)*

If you can keep your head when all about you
Are losing theirs and blaming it on you,
If you can trust yourself when all men doubt you,
But make allowance for their doubting too;
If you can wait not be tired by waiting,
Or being lied about, don't deal in lies
Or being hated, don't give way to hating,
And yet don't look to good, nor talk to wise:

If you can dream -- and not make dreams your master
If you can think - and not make thoughts your aim
If you can meet with Triumph and Disaster
And treat those two impostors just the same;
If you can bear to hear the truth you've spoken
Twisted by knaves to make a trap for fools,
Or watch the things you gave your life to, broken,
And stoop and build'em up with worn-out tools:

If you can make one heap of all your winnings
And risk it on one turn of pitch-and-toss,
And lose, and start again at your beginnings
And never breathe a word about your loss;
If you can force your heart and nerve and sinew
To serve your turn long after they are gone,
And so hold on when there is nothing in you
Except the will which says to them: »Hold on!«

If you can talk with crowds and keep your virtue,
Or walk with kings – nor lose the common touch,
If neither foes nor loving friends can hurt you,
If all men count with you, but none too much,
If you can fill the unforgiving minute
With sixty seconds' worth of distance run,
Your is the Earth and everything that's in it,
And – which is more – you'll be a man, my son.

## Minningarorð

# Minningarorð um læknan Johan Djurhuus

»Frítt er Eystfelli frá at fara«, hesi orðini tók Johan til tann fagra ólavsøkumorgun í dýrdarveðrinum, tá hann fór niður á Ríkissjúkrahúsið at taka sín endaliga kamp upp ímóti tí ringu sjúku, sum hann ígjøgnum sítt langa lív sum lækni so mangan dag og dagliga hevði stríðst ímóti – men sum lagnan vildi at enda eisini fekk bast Johan.

Mong munnu tey vera, sum læknin Johan Djurhuus hjálpti og linnaði, og sum eisini við hesi ringu sjúku eydnaðist honum at grøða.

Høgt í metum var hann ímillum sínar starvsfelagar og starvsfólk, bæði her heima, men serliga í Danmark, har hann var vælkendur og ógvuliga avhildin fyri dugnaskap sín innan læknayrki og vísindi.

Lítillátin og skemtingarsamur var Johan, ungur av lyndi. Hóast árini vóru mong, so spardi hann ongantíð seg sjálvan, tá boð vóru eftir honum, læknin sum starvaðist til tað síðsta, og stýrdi hann sjálvur viðgerð og kanningum inntil sín síðsta andadrátt tann 12. august á Ríkissjúkrahúsinum, har hann varð móttikin við virðing og fekk alla ta hjálp, ið gevast kundi.

Síðan Johan legði frá sær sum yvirlækni, var hann ofta at síggja við læknatasku síni, og mong vóru tey fólk, sum dagliga ringdu at fáa ráð og hjálp frá honum, og kom tað dátt við hjá fólki, at Johan Djurhuus so brádliga var heimfarin.

Johan vaks upp í Porkeri, sonur Annu Sofiu og Alexandur Djurhuus. Systkini vóru fimm í tali. Johan var elstur.

Johan fór til Danmarkar á heilt ungum árum á kostskúla, tók studentsprógv frá Rungsted Gymnasium, fór síðan at lesa til lækna, starvaðist á donskum sjúkrahúsum og var visitator í Storkøbenhavn í 16 ár.

Í 1972 kom Johan Djurhuus til Dronning Alexandrines hospital sum yvirlækni í radiologi (røntgen), men samstarvið við Finsens Institut helt fram, har boð mangan vóru eftir honum, tí serliga henda ringa sjúka hevði Johansa stóra áhuga.

Ærað veri minnið um henda stóra læknan. Hvíl í friði í Guds hondum, nú árarnar eru lagdar inn.

**Familjan**



# Til Álv

Góði Álvur, ungur fórt tú
hesum heimi frá
ongantíð vit teg tó gloyma
títt blíða andlit, eygu blá.

Ei lagnan altíð tær til vildar
var í hesi verð
gævi at tað kennist betur
har andi tín nú er.

Viljan átti tú av stáli
tað kann sláast fast
kennist tað tí sera svárt
nú alt úr hondum brast.

Hvíl í friði, kæri frændi
sett tú hevur spor
í hjørtum okkar' goymast minni
fátæk kennast orð.

***Bjarni, Jákup og Rúni***

# Samhugaheilsan

Hvør veit, nær stundin er at enda,
vit mangan verða mint hará,
men lívið tað skal aftur venda,
tað sigur orðið okkum frá.
Í føgrum blóma lívið var,
í heimi deyðans tøgn tú sær.

Mong sorgartár av kinnum renna,
tí samkenslan í barmi slær,
um enn vit ongan munnu kenna,
nú lívið tungt til tykkum sær,
nú Tvørábygd so hart varð rakt,
sum orð tey ikki megna sagt.

Vár góði Gud, í himli situr,
hann hevur ikki gloymt sítt barn,
hann blítt og eymt at okkum lítur,
um fløkt vit verða í mangt garn.
Mín eygnasteinur er í verð,
í mína hond skrivaður er.

Tað er mítt hjartans bøn og ynski,
Gud veiti tykkum sína troyst,
at hansar' hjálp og hansar' styrki,
sum hevur oss úr deyða loyst,
má leiða tykkum hvønn ein dag,
inntil tit aftur møtast glað.

Jesus sigur: »Eg livi, og tit skulu liva.«

*Kærar heilsanir til*
*øll tey avvarðandi*
***nj***



## Orðið

*Les Lukas 7,1-10*

### VIRKIN TRÚGV

*Tykkum verði eftir trúgv tykkara!*
*– Matteus 9,29*

IKKI ØLL trúgvandi hava somu trúarstyrki. Summi tykjast halda vandamálið vera Gudi ov torført at loysa. Onnur eru viss í, at Gud er almáttigur, men tey líta ikki á, at Hann fer at gera teimum tað besta. Uppaftur onnur hava uppi: Eg veit, hvat Gud megnar, og eg líti á, at Hann ger tað. Hann hevur lovað! Ymsi hugburðurin røkkur frá veikari og trilvandi trúgv til bergfast álit, ikki at ivast um orð Guds, men trúgva, at Hann er góður.

Sum vit rannsaka tænastu Jesusar, síggja vit misjavna trúarstyrki hjá teimum, sum komu til hansara. Hann rak út tagnaranda úr syni, hvørs faðir dongdist millum trúgv og iva (Markus 9,17-24). Hann grøddi spitalskan, sum visti, at hann *megnaði*, men ivaðist, hvørt Hann *vildi* (Markus 1,40-45). Og Hann grøddi tænara hjá høvuðsmanni, sum var so trúarvissur, at Hann bað Jesus bara siga orð úr fjarstøðu (Lukas 7,1-10).

Hesi dømi læra ikki, at Gud altíð svarar eftir trúarstyrki. Heldur svarar Hann í vísdómi sínum einari og hvørjari trúarstyrki. Evsta endamál Hansara er at fáa okkum til heilt at líta á seg, so at vit fáa at sanna fullkomileikan í samfelagi við Hann. Av tí, sum Jesus er, fær Hann broytt veikastu trúgv í sterka trúgv.

© –prp–